# BØNARLØTAN

APRÍL 2026 41. árg.

## *1. Mikudagur* *Fil. 1.1-30*




### FØROYAR

### Atlantic Mission

Uml. 200 vóru til skeiðið *Lær at siga bíbliusøgur.* AM skipar fyri venjing og evangelisering í Føroyum alt árið. Nógv høvi eru at taka lut, t.d. at geva ferðafólki faldaran *Faroe Islands*. Flestu ferðafólk taka glað ímóti faldaranum og skunda sær víðari. Annað høvi er at vera við til kaffi og prát í miðbýnum ella ganga hurð til hurð. Vit fyrireika og venja, áðrenn farið verður til verka. Tilmelding: ring ella skriva til Ruth Gaardlykke, 519090, atlanticmission@mail.fo

**KRINGVARPIÐ**

5. apr. Útvarpsmøti úr Ebenezer
12. apr. Sjónvarpsmøti úr Hebron, Leirvík

**EVANGELISKA RØDDIN – Aldan (meir á www.evr.fo)**

Sunnukv. kl. 21 Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21 Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**



Vit fyrireika fýra heftir á mixtec við littekningum til páskirnar. Biðið, at heftini verða til signing fyri tey, sum fáa tey.

## *2. Skírisdagur* — *Jer. 17.1-27*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**



Páskamøtir á Malta, Vinkelvej 2, Hirtshals, skírisdag kl. 20, langafríggjadag, leygardag og páskadag kl. 18. Jens Bech, Otto West, Svein í Prestgarði og Virgar Kjærbo vitja. Biðið fyri møtunum, sum bera heitið *Streymar, streymar av náði.*

## *3. Langafríggjadagur* — *Jer. 18.1-23*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Tað var gott á trúboðarastevnuni at hoyra um trúboðan kring heimin og verk Harrans. Takk fyri forbøn. Biðið fyri møtunum, sum verða um páskirnar.

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 14, Emma 9**



Samkoman skipar fyri møtum og tiltøkum um páskirnar. Biðið fyri øllum teimum, sum koma, bæði børnum og vaksnum.

## *4. Leygardagur* *Fil. 2.1-30*

**OM Føroyar**
**Margareth Djurhuus, landsleiðari, OM Føroyar**

Leiðsluráðstevnan í mars eydnaðist væl. 4.-5. apríl verður OM á páskastevnuni á Kambsdali og kanska øðrum við. 10.-24. apr. verða Cecile og Jóhannis Mortensen og døturnar heima og vitja tá samkomur. *Franskt kvøld* verður 22. apr. í Betesda, har tey kunna um OM-tænastuna. 17. apr. fer 18 ára gamli Jógvan Karstin í Løðuni, Eiði, til *Off the Grid* í Nýsælandi. Elisabeth í Túni Nielsen kom heim av *Off the Grid* í mars.



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Sandfrakt fer til Grønlands fyrr í ár enn vanligt. Vit plaga at fáa mat og útgerð til legurnar við teimum. Í tí sambandi fer Páll yvir eftir páskirnar. Tað kennist sárt, tí vit mugu sanna, at tað verður ikki ofta, vit orka meiri. Biðið, at HARRIN gevur mót og styrki og sendir onkran í okkara stað!

## *5. Páskadagur* — *Jer. 19.1-15*



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Eg skal tala seks ferðir í Filipsoyggjum. 29. apr.-4. mai verði eg í Malaisia. Biðið fyri ferðini.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Annar páskadagur* — *Jer. 20.1-18*



**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 5, Boas 3, Jóanes 0**
Húsbólkar møtast her annanhvønn týsdag, fýra blandaðir og ein familjubólkur. Hetta er gott høvi hjá fólki at koma at kennast tvørtur um aldur, áhugamál o.a. Vit lesa Orðið, granska og biðja saman.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 11**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein**

## *7. Týsdagur* — *Fil. 3.1-21*

**OM Føroyar, TeenStreet og Logos Hope**
**Margareth Djurhuus, landsleiðari, OM Føroyar**

10.-11. apr. verður Mini TeenStreet. Debs og Josh Walker undirvísa. Evnið er *Paths (leiðir)* út frá Orðt. Biðið, at ungdómur verður kveiktur. 13.-20. apr. verður stuðulsvikan fyri TS, útlond. Ewout van Oosten, altj. leiðari hjá TS, kemur til Føroya. Endamálið




er at røkka fleiri tannáringum við gleðiboðskapinum, serliga í londum, har fíggjarligu korini eru trong. Logos Hope er í dokk í Malaga. Súsanna og Guttorm Joensen mynstraðu av síðst í mars, og Jóhanna H. Olsen fór av fyrst í apr. Bráðfeingis tørvur er á manning til maskinrúmið og brúnna frá 1. mai.

### DANMARK, Odense
### Árni Helmsdal

Vit takka fyri nýggju hølini á Rødegårdsvej 174. Biðið, at Harrin leiðir fólk á fund, tí seinast viltust fleiri, sum brúktu GPS.

### PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)
### Carol og Poul Joensen

## *8. Mikudagur* — *Jer. 21.1-14*

### FØROYAR
### Shamila og Høgni Johannesen

Biðið fyri arbeiði okkara við ensku útgávuni av STEVN. Hetta er sera tíðarkrevjandi. Upptøkurnar verða helst lidnar síðst í apr. Biðið fyri møtum, samtalum og tænastuni á netinum.

### ZAREPTA



Høvuðsreingerð fram til 14. apr. Familjulega-1 15.-19., familjulega-2 22.-26. apr. Várlegan fyri fólk við breki 1.-3. mai. Umvæling og nýgerð

av kømurum til legurnar er í gongd. Kunning: Agnar Josephsen 216357.




**OM, SUÐURAFRIKA,**
**OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 2**

*Í dag fyllir Ryan Jensen 17 ár

## *9. Hósdagur* — *Jer. 22.1-30*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 15, Leah 12, Abigail 7**

Vit verða í Føroyum 10.-24. apr. og ætla at vitja bæði familju, vinir og samkomur. Skriva til mortensenjohannis@gmail.com um nærri kunning. Skrá fyri vitjanina er á heimasíðuni hjá OM Føroyar, www.om.fo

## *10. Fríggjadagur* — *Fil. 4.1-23*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Umsetingarráðgevin hevur nú rættlisið 1. og 2. Kongabók. Vanligi málhjálparin var tøkur og kom allan vegin úr Dakar. So verður gjørt klárt at prenta. Ungi umsetarin skal skurðviðgerast í eygunum í apr. el. mai. Biðið fyri honum. Erik og Wendy eru farin heim í nakrar mánaðir, so eg haldi fram við bíbliutímunum. Ætlanin er at lesa ígjøgnum NT. Av brøvunum mangla nú Rómbr. og 1. og 2. Korintbr. Tað tekur helst eini 25 kvøld at koma ígjøgnum tað. Eg vóni eisini at lesa evangeliini og

Áp. í tveir tímar um morgnarnar saman við teimum, sum hava hug at luttaka. Nógv skal fáast frá hondini, áðrenn eg komi heim í summar. Biðið, at Harrin styrkir og gevur vísdóm.



**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Tabita 12, Debora 10, Natan 7**

## *11. Leygardagur* — *Jer. 23.1-22*



**DANMARK, Glostrup Frikirke**
Jens Fuglø og Kristian Guttesen eru tveir av elstum okkara. Símun Fuglø, sum eisini er elsti, er álvarsliga sjúkur við krabbameini. Biðið eisini fyri Hannu og Símuni í hesi so tungu tíð teirra.

**DANMARK, Kolding, Anne Zachariassen**
Minnist Anne í sorgini, nú Jan flutti heim til Harran. Bønarløtan ber henni samkensluheilsan við forbøn.

## *12. Sunnudagur* — *Jer. 23.23-40*



**ONGLAND, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Lydia 16**
Tað var eggjandi at síggja, hvussu bíbliuundirvísing broytti hugburðir á skeiðnum í mars. Fundir verða í Niðurlondum 13.-17. apr. Biðið, at Gud hjálpir okkum at menna samstarv millum trúboðarafelagsskapir í Evropa.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna Rodda**

## *13. Mánadagur* — *Kol. 1.1-29*



**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 17**
Marion og eg fara til Guinea hálvan apr. í tvær vikur. Biðið fyri ferðini, at vit verða til signing, og at fólk eru opin fyri orði Guds. Ryan verður eftir í Dakar. Dakar Academy, har Ryan gongur í skúla, tørvar fleiri nýggjar lærarar komandi skúlaár. Biðið, at Harrin leggur onkrum á hjarta at koma.

## *14. Týsdagur* — *Jer. 24.1-10*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**
Emanuel hevur fyribils ongan skipara í juni og frá hálvum aug. og allan sept. Tørvur er eisini á einum eyka skipara.

## *15. Mikudagur* — *Jer. 25.1-17*

**DANMARK, Frikirken í Bindslev, Jylland**
Vit hava lisið Jákupsbr. í mars. Ein hevur lagt fram, og vit hava tosað saman um tekstin. Í apr. verða ymiskir talarar. Biðið Harran signa tiltøkini.

**FØROYAR**
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur
á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði,
Terji 13, Petra 11**
**– Anna og Óli Steinberg**



## *16. Hósdagur* *Jer. 25.18-38*

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**
Okkum tørvar navigatørar og maskinfólk til Juvel II umframt tónleikarar/sangarar og fólk, sum kunnu hava eitt orð. Biðið, at enn fleiri ung vilja luttaka í arbeiðnum. Áhugað ringið 285007.

**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**
**– Maria og Jens Bech**



## *17. Fríggjadagur* *Kol. 2.1-23*

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**
Daniel verður í Uganda 17.-27. apr. saman við Monnie Brewer, trúboðara úr Texas. Teir skulu har saman við tveimum pastorum hava seminar fyri



30-40 pastorar, ið eru flýddir úr Sudan. Í størstu flóttafólkaleguni eru 180.000 fólk.

**ÍRLAND, Carlow,**
**Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**



**Mission Aviation Fellowship,**
**MAF Føroyar**
**Martha og Andrias Hansen**

## *18. Leygardagur* — *Jer. 26.1-24*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 12, Micah 12**
Nógvar familjur flyta av landinum hetta árið, og vit søkja Harran um fleiri sunnudagsskúlalærarar og tveir elstar afturat.

## *19. Sunnudagur* — *Jer. 27.1-22*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
20. apr.-9. mai verða vit í Sanford, Florida, til ymiskar leiðslufundir.

## *20. Mánadagur* — *Kol. 3.1-4.1*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 8, Timon 6, Manuel 2, Salome 2**
Fyrsta kovol lesi- og skriviskeiðið byrjar skjótt. Vit høgga trø niður, rudda burtur illgras og gera ein skúlabygning. Vit komu fram á eiturorm, men eingin vandi var á ferð. Vit senda eisini

lesi- og skriviskeiðstilfarið til ráðgevar okkara at eftirkanna. Síðani verður prentað og sent inn í Kovol við tyrlu. Vit vóna at byrja undirvísingarskeiðið í mai. Biðið, at alt gongur væl, og at vit skjótt kunnu læra kovolfólkið at lesa og skriva teirra egna mál!



## *21. Týsdagur* *Jer. 28.1-17*

**TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)**
**Annika og Stephen Everett**

Í gjøgnum ramadan mánaðin hevur bíbliubrævskeiðið fingið nógv fleiri fyrispurningar um kristnu trúnna, og bóklingar og lesnaður um bíbilska føstu við skriftstøðum o.ø. vórðu send út. Minnist Umit bólkin, sum tey fyrireika tiltøk, sum verða næstu mánaðirnar, og serliga árliga tiltakið 23. apríl úti á oynni Buyuk Ada, at mong koma at hoyra evangeliið og til forbøn.

## *22. Mikudagur* *Jer. 29.1-16*

**TÝSKLAND, Hückeswagen,**
**Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 14**



Ávís innfararloyvi verða ikki longur givin í Papua Nýguinea. Hetta merkir, at eingin yngri enn 23 ár sleppur at vera meir enn 60 dagar í landinum. Hetta forðar ungfólki at tæna har. Biðið, at hesin trupulleikin verður loystur.

## 23. Hósdagur — *Jer. 29.17-32*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 9**
Skovlunde Frikirke hevur samkomulegu 1.-3. mai. OM Danmark vitjar. Evnið er *Kaldet og Sendt*. Vit hugsavna okkum sum samkoma um kallið til missión, bæði í DK og kring heimin. Biðið, at Gud gevur íblástur.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Vit hava verið á samkomulegu.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Jónatan 16, Markus 14, Evita 11, Joy 9**



**MEKSIKO, Maravito**
**Isabel og Edy Mora**
**Marianna 0**

## 24. Týsdagur — *Matt. 27.20-44*

**ONGLAND, Taunton, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**
Í apríl verða vit mest heima. Pápi Simon fyllir 90 ár 24. apr., og vit hátíðarhalda dagin saman við familju. 29. apr. fer Simon til Balkanlondini í 10 dagar til *Prayer Days* í Albania og síðani at hitta trúboðarar, sum tæna í egnum landi.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 17, Noah 16, Karis 12, Judah 10, Ethan 8**



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 9, Jude 7, Evelyn 5, Olivia 2**

## *25. Flaggdagur* *Jer. 30.1-24*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 5, Selah Rose 3**
Vit skulu ættleiða tvey børn úr Liberia og bíða eftir telefonboðum frá barnaheiminum. Hetta kemur helst í lag innan eitt ár. Vit ferðast rættiliga nógv til samkomur í USA at greiða frá arbeiði okkara. Biðið um trygd á vegunum og fyri Krissy, nú hon skal eiga okkara triðja barn í mai.

*Í dag fyllir Markus Tuohy 14 ár

## *26. Sunnudagur* *Jer. 31.1-19*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**
Umsetingin til kankanaeymálið gongur framá. Tó er heilsan hjá einum umsetara so mikið versnað, at tað er ivasamt, hvussu leingi hann kann gera hetta arbeiðið. Tí er so umráðandi, at umsetingin verður liðug. Biðið fyri hesum. Jesus segði, at arbeiðsmenninir eru fáir – tað er framvegis so. Vit hava hjálpt til í



samkomuni í Saddle hvønn sunnudag, og 14. mars vórðu 7 doypt har.

## *27. Mánadagur* — *Jer. 31.20-40*



**Susan og Øssur Berghamar**

Vit eru takksom fyri, at vit framvegis kunnu vera við í verkinum í Kristnastovu, hóast komin upp í eldri ár við minkandi orku. Um somu tíð gleðast vit um øll tey ungu, sum eru trúføst og virkin. Biðið, at tey mennast í tænastu og ábyrgd.
berghamar@kristnastova.dk

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Týsdagur* — *2. Tess. 1.1-12*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 17**

Í okt. í fjør fekk eg, Tim, varandi uppihaldsloyvi í Føroyum. Hetta gevur mær loyvi at vera í Filipsoyggjum upp til seks mánaðir um árið.

## *29. Mikudagur* — *2. Tess. 2.1-17*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 14, Noah Kristian 11**

Kríggið í og kring Iran ávirkar trúboðarar og tvørmentanarlig starvsfólk. Nógv, ið tæna har, eru ótrygg og óttafull. Nógv skulu taka truplar avgerðir viðvíkjandi tænastu og familju, og vit fáa nógvar fyrispurningar um hjálp. Biðið um vísdóm, frið og varðveitslu fyri tey, sum tæna í økinum, og fyri lokalsamfelagið, har tey búgva. Biðið eisini fyri okkara toymi, nú vit veita umsorgan og vegleiðing til øll tey, sum heita á okkum í hesum truplu tíðum.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 16, Nana 14, Louie 12, Rio 6**

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**


Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## C.S. Lewis – hans liv, tanker og verden – en biografi
**336 síður 249,95 kr.**

Thomas Ø. Aallmann hevur skrivað fyrstu donsku ævisøguna um C.S. Lewis, ein hin kendasta kristna trúarverjan í nýggjari tíð. Vit møta skaldinum og ateistinum, sum fór í kríggj, fann vegin aftur til Guds og skrivaði um meiningina við lívinum. Bókin gevur eina yvirskipaða ævisøguliga mynd av C.S. Lewis og ikki minst innlit í trúgv og lívsáskoðan hansara.

Bókin kann bíleggjast í bókahandlum ella frá forlagnum ProRex.




**BÓKATÆNASTAN**

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!